Orðingar til virðisløni

ÁRSINS ÚTGÁVA

Vel ta útgávu, sum er best frágingin, eftir tínum tykki.
At hava í huga: Verkið í síni heild, framleiðslu, ljóðgóðsku, sangirnar sum einkultløg, tekstir o.t.
Útgávan skal verða útgivin (fysiskt og ella talgilt) í 2026 og tilfarið skal vera tøkt at hoyra. Útgávan skal vera minst 15 minuttir til longdar.
*Tað er ein treyt at ein føroyingur er oddafólk, ella hevur ein definerandi leiklut í skapanini. Virðisløni fyri **ÁRSINS ÚTGÁVU** er ikki heft at tónleikastíli.*

ÁRSINS SER-ÚTGÁVA

Vel ta útgávu, sum er best frágingin, eftir tínum tykki.
Virðisløni verður givin eini útgávu, sum er uttanfyri vanligu kommersiellu rammurnar. Tónleikurin stíður av breiða vegnum í leitannini eftir egnu rás. Úrslitið er nýhugsað og øðrvísi.
At hava í huga: Útgávan í síni heild, tónasmíð, tónlistaliga dygd, framleiðslu/arrangement, tekst, úttrykk o.t.
Tað er ein treyt at ein føroyingur er oddafólk, ella hevur ein definerandi leiklut í skapanini. Útgávan skal verða útgivin (fysiskt og/ella talgilt) í 2026 og vera tøk at hoyra.
Útgávan skal vera minst 15 minuttir til longdar.
*Virðisløning fyri **ÁRSINS SER-ÚTGÁVU** er ikki heft at tónleikastíli.*

ÁRSINS SANGUR

Vel tað lagið, sum er best frágingið, eftir tínum tykki.
At hava í huga: Heild, lagasmíð, framleiðslu, tekst o.t.
Talan er um eitt nýskrivað upprunaverk, skriva av einum føroyingi, og harvið ikki eina nýtulking av einum lagi.
*Tað er ein treyt at lagið er útgivið (fysiskt og/ella talgilt) í 2026 og at tilfarið er tøkt at hoyra. Tað er ein treyt at ein føroyingur er oddafólk, ella hevur ein definerandi leiklut í skapanini. Virðisløni fyri **ÁRSINS Sang** er ikki heft at tónleikastíli.*

ÁRSINS TÓNASKALD (at skapa)

Vel ein persón, ið hevur skrivað og smíðað tónleik í 2026. Virðisløn kann handast fyri eitt einstakt verk ella fleiri avrik í 2026.
Virðisløn skal varpa ljós á tey, ið skapa tónleik í Føroyum. Tað er ein treyt, at persónurin er føroyingur og at tónleikurin hevur sæð dagsins ljós í 2026.
Dømi: tónaskald fyri tónleikaútgávu, ein film/teatur komponistur ella annað slag av komponisti/sangskrivara.

ÁRSINS SPÍRI

Ársins Spíri er ein persónur ella projekt/bólkur, sum fyri fyrstu ferð hevur gjørt vart við seg á tónleikapallinum og fyri fyrstu ferð hevur útgivið tónleik í 2026.
Viðkomandi persónur/ar nýtist ikki at vera nýggjur á tónleikapallinum og virðisløn er ikki tengd at aldri, men bólkurin/samanhangurin skal vera nýggjur.